Fiskimálaráðharrar vitja Fish Fair

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, fer saman við grønlendska og russiska fiskimálaráðharranum at vitja á North Atlantic Fish Fair. Høvið verður eisini hjá gestunum at síggja seg eitt sindur um á vitjanini í Føroyum

FORKUNNUG VITJAN
Vilmund Jacobsen

Stutt eftir, at Jacob Vestergaard hevði tikið við sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum, bjóðaði hann norðurlendsku fiskimálaráðharrunum og starvsbrøðrum teirra í Kanada, Russlandi og Chili á vitjan í Føroyum. Somu innbjóðing fekk eisini fiskivinnukommiserurin hjá ES. Tað er altjóða fiskivinnu- og alistevnan, North Atlantic Fish Fair, sum var skumpið til hesa innbjóðing.

Jacob Vestergaard sigur, at nú avtornar, koma bert tveir av innbodnu gestunum til Føroya, nevniliga grønlendski og russiski fiskimálaráðharrin, báðir við fylgi.

– Ferðalagið úr Ruslandi telir eini 5-6 fólk og ferðalagið úr Grønlandi eini 2-3, sigur hann.

Ymiskar orsøkir

Spurdur, hví aðrir hava givið avboð, sigur landsstýrismaðurin, at tann íslendski gav avboð orsakað av valinum, sum stundar til í Íslandi, og bæði tann norski og kanadiski høvdu annað á skránni hesar dagar.

– Kanadiski fiskimálaráðharrin hevði í hyggju at koma higar til lands nakran dagar frammanundan, men táið saman um kom, lá tað ikki fyri hjá honum kortini. Hjá chilenska fiskimálaráðharranum lá heldur ikki fyri at koma, og sama var hjá fiskivinnukommiserinum hjá ES.

Jacob sigur, at høvið verður at hitta fleiri av ráðharrunum á fundi í Halifax tíðliga í summar, og ikki minst gleðir hann seg til at hitta kanadiska fiskimálaráðharran, nú havnirnar í Kanada hava verið stongdar fyri føroyskum fiskiskipum í meira enn eitt ár orsakað av ósemjuni um Grand Bank.

Vit spurdu eisini Jacob, hví hann sum landsstýrismaður avgjørdi at bjóða chilenska fiskimálaráðharranum og fiskivinnukommiserinum hjá ES higar.

– Sum landsstýrismaður var Jørgen Niclasen í Chili og greiddi frá føroysku fiskidagaskipanini. Chilenar vóru ógvuliga hugtiknir av skipanini, og nú hildu vit, at vit skuldu bjóða teimum higar. Vit hava nógv fiskivinnusamstarv við ES, og tí avgjørdu vit eisini at bjóða fiskivinnukommiserinum higar, sigur Jacob.

Útferðir, fundur og framsýning

Landsstýrismaðurin sigur, at ein fyribilsskrá er løgd fyri vitjanina hjá grønlendska og russiska fiskimálaráðharranum.

– Ferðalagið úr Grønlandi og Russlandi kemur higar sunnudagin, tá ið vit fara at taka ímóti gestunum, sum síðan fara at gista á Hotel Føroyum. Mánamorgunin verður farið á útferð norður til Gjáar. Síðan verður farið umborð á Norrönu, sum liggur í Saltangará. Her fáa gestirnir innivist, og døguriði verður etin. Seinnapartin mánadagin verður fundur umborð á Norrönu millum fiskimálaráðharrarnar við embætisfólki um mál av felags áhuga. At enda verður farið ein túr við Norðlýsinum mánakvøldið, og tá verður ætlandi borðreitt við alskyns sjómati.

Jacob sigur, at tá ið North Atlantic Fish Fair letur upp týsdagin, fer hann saman við gestunum at vitja runt á stevnuøkinum.

Ætlanin er, at útlendsku gestirnir eisini skulu vitja trygdarmiðstøðina í Klaksvík.

– Á fundinum umborð á Norrönu fara vit at umrøða spurningin um trygd á sjónum, og tí er tað hóskandi at vitja trygdarmiðstøðina, sigur Jacob Vestergaard.

Landsstýrismaðurin heldur annars, at North Atlantic Fish Fair er eitt gott høvi hjá føroyingum at bjóða útlendingum higar at síggja, hvat vit hava at bjóða, samstundis sum møguleiki eisini er fyri at vísa teimum okkara land.



– North Atlantic Fish Fair er eitt gott høvi hjá føroyingum at bjóða útlendingum higar at síggja, hvat vit hava at bjóða, samstundis sum møguleiki eisini er fyri at vísa teimum okkara land, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum sunnudagin fær vitjan av grønlendska og russiska fiskimálaráðharranum

Kall kallar á virkiskundar

Kall ætlar sær at fáa fleiri virkiskundar. Til tess at røkka hesum endamáli bjóðar Kall áhugaverdu avsláttarskipanina, HópKall, og nú eisini allar GSM-tænastur, við einum virki tørvar

Høgni Mohr

Í apríl 2003 var talið á virkiskundum hjá Kalli komið upp um 300. Hetta er umleið 16% av føroyska marknaðinum.

Hesin fittligi hópur av virkiskundum er ógviliga ymiskligur, og orsøkirnar til, at teir hava valt Kall, eru eins ymiskar. Kortini hevur tørvurin á bíligum samrøðum uttan iva alstóran týdning fyri mong. Summi velja eisini Kall av hugsjónarligum ávum. Tey vilja stuðla veruligari kapping á teleøkinum. Og so vilja tey spara. Í hesum sambandi velja tey eisini Kall, tí onkur ávísur fyrimunur passar júst til teirra; til dømis bíligu uttanlandssamroðurnar.

Hóast orsøkirnar til at skifta til Kall kunnu vera mangar, tykist lítil ivi vera um, at júst tær bíligu uttanlandssamroðurnar frá Kalli hava stóran týdning fyri nógvar virkiskundar. Nevnast kann, at minuttprísurin til Onglands er sløk 50% lægri enn hjá kappingarneytanum.

Fleiri størri kundar

Eisini á virkisøkinum gongur eftir ætlan hjá Kalli. Men í ár ynskir Kall sær millum annað fleiri størri kundar. Í hesum sambandi ger Kall vart við, at bæði í tí almenna og í vinnulívinum eru tað fleiri, ið høvdu viljað minkað útreiðslurnar til samskifti. Tí heldur Kall, at fleiri áttu at tikið av góðu tilboðunum frá Kalli.

Av teimum 7 ráðunum undir landsstýrinum er tað bara Vinnumálaráðið, ið hevur veittrað Føroya Tele farvæl og tikið upp samstarv við Kall. Tó eru onnur ráð og vinnukundar, sum hava víst stóran áhuga. Hetta er eitt gott rák fyri Kall, og á Kalli vóna tey, at gongdin fer at halda fram.

Mótstøða móti mýtum

Kall hevur síðan tað varð stovnað í 1999 stríðst við mýtur og ávísan iva millum fólk. At byrja við varð ivi sáddur um nú tænastustøðið hjá Kalli fór at vera í minsta lagi eins gott og hjá elligamla einkarfelagnum. Spurt varð eisini, um neyðugt fór at vera at skifta fastnetnummar og um mann nú kundi vænta at hvørva úr telefonbókini. Kall kann framvegis sissa øll ivandi og staðfesta, at allar slíkar tænastur eru væl varðveittar.

Á Kalli verður eisini staðfest, at fleri kundar geva fleiri tænastur, og at tí er neyðugt at beina burtur mýturnar. Fleiri stórar fyritøkur hava verið Kallkundar leingi, og hetta samstarvið hevur verið ólastandi. Á Kalli staðfesta tey, at slíkir stórir kundar neyvan høvdu verið verandi hjá Kalli, virkaði samstarvið ikki nóg væl.

Tá ið mýtur og ivi eru beind burtur, gleðir Kall seg til at kunna leggja doyðin á at røkta verandi kundaskara heldur enn at nýta nógva orku at fáa nýggjar kundar.

Fartelefon frá Kalli

At byrja við bjóðaði Kall bara fastnet, men nú er eisini GSM-skipanin ein fullkomiliga virkisfør tænasta hjá felagnum. Kall bjóðar nú bæði talutíð og vanligt GSM-hald. Eisini altjóða reiking, sum gevur kundanum møguleika at fara uttanlands við síni Kallfartelefon, verður veruleiki í næstum. Kall hevur longu fingið avtalu í lag við fleiri lond um slíkt samroðusamstarv.

Tað er einki dulsmál, at á Kalli vænta tey sær nógv fleiri virkiskundar júst orsakað av nýggju GSM-tænastunum hjá felagnum. Summi virki hava nettupp borið seg undan at skifta til Kall, tí tey vilja hava bæði fastnet- og fartelefonir í sama telefelagi. Tey hava tí viljað bíðað til Kall fór at bjóða GSM-hald.

Soleiðis virkar HópKall

Vinnukundarnir hjá Kalli koma undir eina avsláttarskipan, ið eitur Hópkall. Avslátturin verður ásettur eftir, hvussu nógv vinnukundarnir nýta telefonir sínar. Størri nýtslan er, størri verður avslátturin. Skipanin gevur avsláttur fyri at nýta vanliga fastnettelefon og fartelefon. Undir hesum eru til dømis vekslarar, beinleiðis telefonnummur og fastnet- og fartelefonir, ið einstaka virkið rindar fyri starvsfólk.

Listaprísurin við Hóp-Kalli er munandi lægri enn hjá kappingarneytanum. Harumframt er nógv at spara, tá ið nýtslan fer upp um ávíst krónutal um mánaðin. Er nýtslan millum 2.400 og 5.000 krónur, fær kundin 10% í avsláttri. Er nýtslan yvir 5.000 krónur, er avslátturin 20%.

Harumframt sigur Kall, at styrkin hjá felagnum mótvegis virkiskundum er skjót tænasta, at kundin sær dagligu nýtsluna á netinum og ikki minst, at Kall altið er kappingarført í prísi.

Frá

JB TRADE

til

Blika

Vitja okkum á bási 308 í høll E

Nógv nýtt verður víst framm

Serlig tilboð verða á messuni

Blika spf - Akranesg. 9 - tel 356 666

Framvísing av m.ø. hesum:

VECTAIR luftsóttreinsan
ATTEC reinføris slúsir
NILFISK vátsúgvarar
KATRIN reinførispappír
NOVADAN reinførisskipan
VIKAN reinføris útgerð
PLUM trygdarskipan
Dan Dryer luftreinsarar
S. Cleaners skúm útlegging
Clean Tech toku sóttreinsan
Imexpo arbeiðsmáttur